Tvey stig til Hoyvíkina

Hondbóltur: Uttan leikbannaða Petur Martin Johansen formáddur kollfirðingar sær lítið móti H71, sum nú hava møguleikan at vinna seg fram um kollfirðingar

JÁKUP MØRK

Fyri einari viku síðani vóru kollfirðingar um at geva Neistanum ein skelk, tá teir í stórum pørtum av dystinum høvdu eitt sera gott tak á oddaliðnum.

Tað ferðina skrædnaði ballónin tó, tá liðformaðurin og spælskiparin, Petur Martin Johansen, varð rikin av vølli.

Reyða kortið hevði við sær, at Petur Martin ikki var við, tá kollfirðingar sunnudagin skuldu royna seg móti hoyvíkingum, og skuldi vísa seg at verða ein dyggur smeitur fyri kollfirðingar.

H71 eisini skert

Ikki tí, hoyvíkingar vóru eisini rættuliga skerdir, tí fleiri av teimum leikarum, sum undanfarnu dystirnar hava mannað liðið, vóru ikki við, orsakað av fótbóltsørindum, men kortini mundi smeiturin vera dyggastur hjá kollfirðingum.

Teir fingu nevnliga ongantíð glið á spælið, og hóast teir fyrsta hálvan tíman fylgdu væl við hoyvíkingum, so var alla tíðina sjónligt, at hoyvíkingar høvdu góðan møguleika at vinna dystin.

Fyrra umfarið megnaðu teir tó ongantíð at skræða seg rættuliga leysar, men beinanvegin, sum seinni hálvleikur byrjaði, lupu teir avstað.

Eftir lítlari løtu høvdu teir vunnið seg seks mál fram um mótstøðumenninar, og hóast kollfirðingar megnaðu at minka nakað um munin, so vóru teir ongantíð nær námind sigrinum, sum hevði tryggjað teimum fimta plássið á stigatalvuni.

Nú er ístaðin brádliga líkt til, at hoyvíkingar kunnu vinna sær hetta plássið, tí hóast teir enn eru eitt stig aftan fyri kollfirðingar, so eiga teir ein dyst móti Tjaldrinum, og útlitini fyri sigri í hesum dysti mugu sigast at vera rættuliga góð.

Týdningarleys pláss

Bæði kollfirðingar og hoyvíkingar eru nú vísir í, at teir í øllum førum ikki enda á niðasta sessinum á stigatalvuni. Týdningurin av hesum er tó mest av sálarligum slag, tí sum støðan er í løtuni, so hevur tað so at siga ongan týdning, um lið endar aftast ella ikki.

Tað er nevnliga soleiðis, at einki av teimum sjey liðunum í fyrstu deild kann flyta niður hetta kappingarárið. Einasta felag í aðru deild, sum ikki hevur lið í ovastu deildini, er Stjørnan, og tá Klaksvíkingar liggja aftastir í sínari deild, ber sjálvsagt ikki til at flyta niður.

Sjálvsagt ein harmulig støða, tí við hesum hvørvur samstundis tann spenningurin, sum eigur at vera í slíkum dystum.

Dysturin í tølum
Málskjúttar:
H71: Eyðun Højgaard 10 (3), Halgir Dahl Olesen 7, Rene Dahl Olesen 3, Olaf Vestergaard 2, Tróndur Vatnhamar 2, Johnny Joensen 1
KÍF: Vagnur Johannesen 5, Eddie Joensen 4, Petur Martin Poulsen 3, Jákup Dam 2, Jónálvur Johannesen 2, Kristian Madsen 2, Hallur Hansen 1, Finn Heri Johannesen 1
Brotskøst:
H71 3, KÍF 3
Útvísingar:
H71 4, KÍF 2
Dómarar úr Tjaldur:
Dánial Hansen og Kári Hansen

Herfølge framvegis málleyst og stigaleyst

***Superligan:** Jákup Mikkelsen var einasti føroyingurin, sum spældi sunnudagin, tá FCK málverjin tapti teirra dyst, og AGF við sigri í Esbjerg slapp úr botninum*

Føroysku landsliðsspælararnir í donskum fótbólti eru partar í einum øgiligum stríði, sum ikki bara snýr seg um stig og heiður. Peningaligu upphæddirnar, sum standa upp á spæl, eru stórar.

Um tað skuldi eydnast hjá Herfølge at vunnið DM, og um teir síðani sleppa upp í part í europeisku meistarakappingini, so fara teir at vinna so nógvar milliónir, sum teir tilsaman higartil ikki hava vunnið.

Og í donsku bløðunum í gjár var staðfest, hvat tað fer at kosta felagnum hjá Óla Johannesen, AGF, um teir tapa í botnstríðnum og komandi kappingarár skulu spæla í næstbestu deildini. Kostnaðurin verður sagdur at fara at verða 30 milliónir krónur, so tað eru ikki smávegis upphæddir.

Óli hugdi at

Tá upphæddin verður havd í huga, er tað ikki at undrast á, at smílini umframt hjá spælarunum eisini vóru stór á ábyrgdarmonnunum í AGF, sum sunnudagin vóru í Esbjerg.

Óli Johannesen var ikki á liðnum hjá AGF. Hann var millum teir 6.796 áskoðararnar, sum hugdu at. Sjálvandi fegnaðist føroyski landsliðsmaðurin um sigurin.

Flestu áskoðararnir vónaðu, at heimaliðið fór at vinna. Vónin var ikki heilt av leið, tí Esbjerg hevði frammanundan vunnið í Brøndby. Men tað gekk, sum tað ofta ger hjá veikum liði,ið frammanundan hevur vunnið stóran bita. Lennart Bak stútaði AGF framum stutt eftir steðgin, og hetta var einasta málið í góðveðrinum ítróttarparkini í Esbjerg.

AGF sigurin hevði við sær, at Esbjerg datt niður á aftasta plássið. Tá hesi bæði liðini hittust í heyst, vann AGF. Øsing stóðst av, at dómarin, Knud Erik Fisker, var óheppin, tá eitt fríspark varð dømt. Esbjerg kærdi og vildi hava nýggjan dyst. Málið er nú hjá Dansk Idrædts Forbund, sum skal taka støðu í málinum í dag.

Fyri vánirnar hjá AGF at varðveita møguleikan at spæla í bestu deildini hevur tað stóran týdning, at teir fáa viðhald og harvið sleppa undan nýggjum dysti og í staðin varðveita tey trý stigini, sum teir vunnu í heyst.

Munurin nógv tódnaður

Herfølge tapti toppdystin á heimavølli 2–0. Harvið hevur úrtøkan hjá Jákupi Mikkelsen og teimum í teimum báðum dystunum eftir vetrarsteðgin verið soltin. Teir hava einki stig fingið, teir hava einki mál skorað, trý mál eru farin ígjøgnum, og nú er munurin aftur til Brøndby, sum aftur er næstfremst, tódnaður til trý stig.

7.356 áskoðarar vóru í Herfølge. Heimaliðið legði bragdliga fyri, men tað var skjótt, at trýstið linkaði, og tað var sjón fyri søgn, at teir í Brøndby høvdu bart skelkin frá 3–2 tapinum í-móti Esbjerg av sær.

Miðskeiðis í 1. hálvleiki setti púra blanki svenski miðvallarin í vinstru, Mattias Jonsson, innaru síðuna á, eftir at Kim Daugaard hevði sneitt fleiri mótstøðumenn burtur av sær. Bara eina lítla løtu aftaná var um reppið, at Brøndby økti, men Jákup Mikkelsen stórbjargaði, og føroyski landsliðsmálverjin var fleiri aðrar ferðir noyddur at vísa sítt kynstur.

Í 2. hálvleiki noyddist Herfølge at flyta fólkið longri fram á vøllin. Á tímaslagnum høvdu teir ein góðan møguleika at javna, men bólturin fór skeivu megin stólparótina. Veteranurin Bent Christensen varð skiftur inn í álopið hjá Brøndby, og eitt korter fyri leiklok staðfesti hann sigurin, eftir at bólturin var komin innfyri.

John Faxe Jensen vildi ikki seta seg sjálvan inn í stríðið móti gomlu liðfeløgunum fyrrenn eitt korter var eftir.

Todi framvegis skaddur

Størsta áskoðaratalið sunnudagin var í Parkini, har FCK klossaði øll stigini burtur móti grannunum úr AB. FCK málverjin, Michael Stensgaard, man leingi fara at hava marruna eftir hetta avrikið.

Todi Jónsson er framvegis so mikið plágaður av liðbandsskaðanum í knænum, at hann fær ikki spælt. Todi var millum teir 16.397 áskoðararnar, sum í góða danska várveðrinum hugdu at. Longu í 3. minutti sóu teir, at FCK málverjin klossaði í sambandi við innlegg eftir hornaspark. Niclas Jensen javnaði eftir hálvan tíma. Hann smoygdi sær framvið fleiri í vinstra borði, og tá hann sendi móti málinum, hjálpti ein verjuspælari til at fáa bólturin um strikuna.

FCK var sannførandi síðsta hálva tíman av fyrra umfarinum, men teir fingu ikki fleiri mál, og tað mundi kennast sum køld pøs í andlitið, at AB skoraði, tá fimm minuttir vóru eftir av 1. hálvleiki. Jan Michaelsen royndi seg úr 30 metrum, og FCK málverjin rakti ikki bóltin, tá hann royndi at verja fyri.

Í 2. hálvleiki fór luftin úr FCK. AB sigurin hevur við sær, at teir nú eru fimm stig frammanfyri FCK, sum bara hevur fingið eitt stig í vár og framvegis er á áttanda plássinum, sum teir hildu vetrarfrí á.

Tað er ikki heilt greitt enn, um tað fer at eydnast, men í FCK vóna teir, at Todi Jónsson verður tøkur, tá teir komandi vikurnar skulu spæla í Jyllandi tvær ferðir. Fyrst skulu teir til Vejle, og síðani skulu teir spæla í Silkeborg.

Komandi vikuskifti skal Herfølge spæla á útivølli ímóti AGF.

JH

Dystirnir hetta vikuskiftið::

Sunnudagin 19. mars
Esbjerg-AGF 0-1
FCK-AB 1-2
Lyngby- Vejle 0-1
OB-Viborg 0-1
Herfølge-Brøndby 0-2

Mánadagin 20. mars
Silkeborg-Aab (leiktur eftir evstamark)

Dystirnir komandi vikuskiftið:

Viborg-Esbjerg
AGF-Herfølge
Aab-OB
AB-Silkeborg
Vejle-FCK
Brøndby-Lyngby

Støðan, danska superligan

		dystir	v	-	j	-	vunnin t	mál	tapt mál	mál-munur	stig
1	Herfølge	20	11	-	4	-	5	32	26	6	37
2	Brøndby	20	10	-	4	-	6	35	22	13	34
3	Lyngby	20	10	-	2	-	8	31	28	3	32
4	Viborg	20	9	-	5	-	6	27	26	1	32
5	Silkeborg	19	8	-	6	-	5	35	18	17	30
6	AB	20	8	-	6	-	6	31	26	5	30
7	AaB	19	7	-	8	-	4	30	22	8	29
8	FCK	20	7	-	4	-	9	20	19	1	25
9	OB	20	4	-	8	-	8	16	26	-10	20
10	AGF	19	4	-	6	-	9	17	29	-12	18
11	Esbjerg	20	3	-	9	-	8	21	37	-16	18
12	Vejle	19	5	-	2	-	12	20	36	-16	17

ÍF og TB halda fram

***Løgmanssteypið:** Allir tríggir dystirnir í vikuskiftinum endaðu við 2–0 sigrum*

Tá tað komandi vikuskifti verður farið undir bólkaspælið í kappingini um løgmanssteypið verða tað 2. deildarliðini hjá ÍF og TB, sum vera við í kappingini saman við teimum tíggju liðunum í bestu deildini. Hesi bæði 2. deildar liðini hava verið mett millum mest uppløgdu evnini at telvast um uppflyting í bestu deildini.

Hvørki á Tvøroyri ella í Fuglafirði munnu teir rokna við, at teirra lið hevur nakran serligan møguleika at røkka so ógvuliga langt í steypakappingini. Men kortini hevur tað stóran týdning fyri liðini at vera komin í bólkaspælið:

– Vit hava vant síðani miðskeiðis í januar, men undan vikuskiftinum høvdu vit bara spælt tríggjar venjingardystir. Tá tú ert á Tvøroyri, og tvey av hinum trimum liðunum í oynni næstu vikurnar fara at spæla nógv í steypakappingini, so sigur tað seg sjálvt, at tað hevði verið torført at fingið avtalur um venjingardystir hjá okkum. Tí er tað kærkomið, at bólkaspælið í steypakappingini so at siga ber okkum seks venjingardystir upp í føvningin.

Hetta sigur Lynge Nielsen, nýggi danski venjarin hjá TB, sum ikki er ókendur í Føroyum og serliga ikki í Suðuroy. Hann hevur áður verið venjari hjá Royn. Ta ferðina var hann spælandi venjari, men nú tekur hann ikki lut inni á vøllinum.

TB–EB/Streymur 2–0

Upprunaliga var ætlanin, at TB og EB/Streymur skuldu spæla næstsíðsta vikuskifti, men so varð avgjørt at útseta til fríggjakvøldið.

Bergur Magnussen er venjari hjá teimum í Sundalagnum, og í fyrstu týdningarmiklu royndini í hesum kappingarárinum tapti liðið hjá honum 2–0. Tapið hevði við sær, at EB/Streymur fer ikki at halda fram í steypakappingini, men tað skal nevnan leggjast stórvegis í avrikið á Sevmýri.

Gestirnir komu so mikið seint suður, at Frits Poulsen hevði ikki møguleika at bríksla fyrstu ferð fyrrenn klokkan var 21.15. Líkindini vóru góð, men spælið var einki at reypa av. Alt ov nógv gekk fyri seg á miðvøllinum, har tað var trongligt, og óneyvu sendingarnar vóru nógvar.

Longu í 3. minutti setti TB miðvallarin Jón Tórður Holm hol á við rimmar frísparki úr 21 metrum. Ferðin var einki at reypa av, men TB var leikliga omaná, og tíggju minuttir eftir steðgin staðfesti álopsmaðurin Dan Mortensen sigurin, tá hann úr 16 metrum í vinstru sendi flatt í handara hornið.

TB–LÍF 2–0

Sunnudagin hevði TB vitjan av leirvíkingum. Spælið var betri, enn tað hevði verið fríggjakvøldið, men leirvíkingar, sum ikki høvdu venjaran suður við, hava onkuntíð verið betri fyri, enn teir vóru sunnudagin.

TB hevði fleiri upplagdar møguleikar í 1. hálvleiki, men Trygvi Olsen vardi LÍF málið væl. Í 2. hálvleiki fekk miðverjin André Dalfoss eitt mál beinanvegin. Vindurin spældi við, og hornasparkið úr høgru fór beinleiðis í málið. LÍF hevði okkurt snarálopið, sum teir vóru vandamiklir í, og ta einu ferðina fór bólturin í stólpan aftanfyri Magna Hentze í TB málinum.

Seks minuttir fyri leiklok økti Hallur Christiansen. Ungi maðurin hevði verið tíggju minuttir á vøllinum, tá hann eftir innlegg úr høgru sneiddi ein av og skoraði.

Millum mest eyðsýnu TB spælararnar bæði fríggjakvøldið og sunnudagin var 16 ára gamli miðvallarin Bárður Dimon. Tað eru góðir møguleikar fyri, at meiri fer at verða at frætta um hansara fótbóltsdygdir í komandi tíðum.

LÍF eigur onga framtíð í kappingini um løgmanssteypið á hesum sinni. Einki skal takast frá TB, men leirvíkingar tóktust sunnudagin ikki at hava lagt stórvegis í at fyrireika seg til steypadystin.

Royn–ÍF 0–2

Í síðstu viku nevndu vit, at hesin dysturin fór at verða spældur á Tvøroyri ella í Vági. Fyrri møguleikin datt burtur, tá TB fríggjakvøldið vann á EB/Streymi.

Ætlanin var, at tað skuldi spælast í Vági, men veðurlíkindini á Vágseiði vóru ikki góð sunnudagin. Ættin var ikki so mein í Sumba, og tað var orsøkin til, at Royn og ÍF spældu á Krossinum.

ÍF hevði undanvind í 1. hálvleiki. Rúni Petersen, sum rættuliga tykist hava fingið luft undir veingirnar í álopinum, setti hol á, tá eitt lítið korter var farið, og miðvallarin í vinstru, Ken Bærendsen, økti til 2–2, tá tíggju minuttir restaðu av fyrra umfarinum.

Royn hevði Bjarna á Hólalagi í málinum. Hann vardi væl, men tá seinna málið kom, fangaðu fuglfirðingar bóltin eftir útspæl frá málverjanum.

At hvalbingar ikki tóktust vera serliga væl fyri sást t. d. aftur í, at teir bara høvdu ein spælara á beinkinum.

JH

Løgmanssteypið
Seinna innleiðandi umfarið
Fríggjadagin 17. mars
TB–EB/Streymur 2–0 (1–0)
1–0: Jón Tórður Holm 3.
2–0: Dan Mortensen 55.
Dómari: Frits Poulsen

Sunnudagin 19. mars
TB–LÍF 2–0 (0–0)
1–0: André Dalfoss 46.
2–0: Hallur Christiansen 84.
Dómari: Jens Petur Brattalið
Royn–ÍF 0–2 (0–2)
0–1: Rúni Petersen 12.
0–2: Ken Bærendsen 35.
Dómari: Frits Poulsen

Bólkaspælið

Bólkur 1
Sunnudagin 26. mars
VB–KÍ og NSÍ–Sumba
Sunnudagin 2. apríl
Sumba–KÍ og VB–NSÍ

Bólkur 2
Sunnudagin 26. mars
ÍF–B36 og B68–B71
Sunnudagin 2. apríl
B36–B71 og ÍF–B68

Bólkur 3
Sunnudagin 26. mars
TB–GÍ og FS Vágar–HB
Sunnudagin 2. apríl
GÍ–HB og TB–FS Vágar

FM verður á Oyrarbakka

Talv: Fyrsta FM í nýggju øldini verður í døgunum 15 - 22. apríl á Oyrarbakka. Talvfelgið Rókur og Talvsamband Føroya samskipa tiltakið, sum verður í Eydnuni.

CARL ELI NOLSØE SAMUELSEN

FM fyri einstaklingar í ár verður skipað á ein øðrvísi hátt enn undanfarin ár. Fyrsta broytingin er, at byrjað verður ein leygardag í staðin fyri fríggjakvøld, og síðsta umfar verður sum vanligt leygardagin, páskaaftan. Telvað verður sostatt í átta dagar.

Sum nakað heilt nýtt er ætlanin at hava ein veteranbólk á páskum. Endamálið við hesum bólki er at savnað teir tilkomnu og eldru telvararnar til at telva eina styttri kapping. Ætlanin er, at Veterankappingin verður telvd í tríggjar dagar, skírishósdag, langa fríggjadag og páskaaftan. Sostatt endar veterankappingin samstundis sum hinir bólkarnir. Luttakararnir telva tvey talv um dagin, har hugsunartíðin helst verður ein tíma í part til talvið. Nærri verður lýst um veteranbólkin.

Eingin snarkapping er á skránni í ár. Ofta hevur tað verið striltið at savna telvararnar aftur til snarkappingina, sum vanliga er 2. páskadag. Tí er avgjørt, at steypahandan og endabrestur verður páskaaftan eftir síðsta umfar.

FM í snartalvi verður tó ikki lagt til viks, tí ætlanin er at hava kappingina út í-móti sumri.

FM fyri einstaklingar verður í Oyrabakka

Landsliðsbólkurin

Tey seinastu árini hevur landsliðsbólkurin verið sterkur, og í ár verður eisini roynt at fáa allar topptelvararnar við í bólkin. Greitt er longu, at John Arni Nilssen verður ikki at síggja á Oyrarbakka ár, men Heini Olsen hevur játtað at vera við. Altjóða meistarin John Rødgaard verður væntandi eisini við.

Flóvin Tór Næs kemur beinleiðis úr kapping í Íslandi og fær verið við.

Rani Nolsøe, Ólavur Simonsen og Eyðun Nolsøe verða somuleiðis við, so talan verður um ein sera sterkan hóp. Ivasamt er enn, um Jens Kristian Hansen, Rógvi Rasmussen og Torbjørn Thomsen hætta sær við, men aðrir sterkir telvarar lúra beint aftan fyri teir.

Sum sagt eru átta dagar til at avgreiða kappingina, og nýggju umfør skulu telvast. Tað vil siga, at tann eina dagin verða telvd tvey talv. Hetta verður tó bert galdandi fyri landsliðsbólkin.

Opin bólkur og unglingar

Eingin 2. bólkur verður í ár, men ein opin bólkur verður í staðin.

Nú ert bert at vóna, at teir, sum akkurát verða ov stuttir til landsliðsbólkin, ikki setast aftur, men fara at luttaka í opna bólkinum.

Unglingarnir Martin Poulsen, Hans Kristian Simonsen, Ingolf Gaard og Olaf Berg fara væntandi at luttaka í hesum bólki. Teir eru vorðnir alt ov sterkir til unglingabólkin, og spurningurin er, um teir ikki eisini eru ov sterkir til opna bólkin.

Sum nakað nýtt verða telvd átta umfør í opna bólkinum.

Unglingabólkurin hevur altíð verið væl umboðaður, og tilfarið í ár er eisini gott. Tí kunnu væntast nógvar unglingar í ár. Átta umfør verða somuleiðis telvd í unglingadeildini.

Lýst verður nærri í bløðunum, hvussu telvararnir kunnu tekna seg til kappingina. Í skrivandi løtu er ikki heilt greitt, um teknin-gin eisini fer fram beinleiðis um internetið. Men nærri fæst at vita um tað.

Talvstubbi

CARL ELI NOLSØE SAMUELSEN

Flóvin Tór Næs fekk hálvt fimta stig av níggju møguligum í kapping í Ungarn herfyri. Sjey av teimum tíggju talvunum hjá Flóvini endaðu jøvn. Føroyski telvarin var styrkismettur sum nummar átta av tíggju telvarum, men endaði á fjórða plássi. Hetta má metast at vera væl klárað.